KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 26.02.2015 kl. 17:30
Málnr.: 13/00245

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Óluva Klettskarð, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen
Ikki møtt: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen

Málsyvirlit			**Síða**
Til viðgerðar			
4/15	15/00124-1	Nýggjur økispartur í byggisamtyktini - økispartur G (landbúnaðarøki)	
5/15	15/00140-3	Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 1348b og 1351a	
6/15	14/00900-2	Fyrispurningur um sundurbýti av matr. nr. 45b á Strond	
7/15	15/00064-7	Víðarisøla av matr. nr. 1006y	
8/15	15/00168-1	Framflyting av játtanum frá 2014 til 2015, samlimál - *eykajáttan, fyrra viðgerð*	

4/15
15/00124 Nýggjur økispartur í byggisamtyktini - økispartur G (landbúnaðarøki)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.02.2015	9/15	
2 Klaksvíkar Býráð	26.02.2015	4/15	

Frágreiðing um málið:
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu umfatar økini A-F

A: Blandað íbúðar- og vinnuendamál
B: Vinnuendamál
C: Almenn endamál
D: Fríøki
E: Miðstaðaendamál
F: Summarhúsøki (við í upprunauppskotinum, men vantar góðkenning)

Onkursvegna er økisparturin fyri landbúnað, sum var við í upprunaligu byggisamtyktini, gloppin burturmillum, og er tí neyðugt at fáa hann innbygdan sum skjótast. Ásetingarnar fyri økispartin verða tó framhaldandi tær somu, bert tillagaðar til nýggja formatið.

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin

Tilmæli:
Mælt verður til, at Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu verður útbygt við økisparti G, sambært viðhefta skjali I.

Nevndarsamtyktir:
UBN 16-02-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 06-02-2015

Býráðsins samtykt 26-02-2015:
Samtykt at taka undir við UBN 16-02-2015.

5/15
15/00140 Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 1348b og 1351a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.02.2015	17/15	
2 Klaksvíkar Býráð	26.02.2015	5/15	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn móttikin 11. februar 2015. Umsóknin leggur upp til at rætta upp/flyta markið millum matr. nr. 1348b og 1351a soleiðis, at frástøðan frá húsunum á matr. nr. 1348b og suður til markið verður uml. 6 m í gongubreytarlinjuni. Báðar ognirnar koma framhaldandi at liggja innanfyri karmarnar í byggisamtyktini í samband við vídd, frástøðu til grannamark og ábyggingarstig.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan ikki partur í málinum

Tilmæli:
Mælt verður til at senda umsóknina víðari til Matrikulin hjá Umhvørvisstovuni við tilmæli um at játta.

Nevndarsamtyktir:
UBN 16-02-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-02-2015

Býráðsins samtykt 26-02-2015:
Samtykt at taka undir við UBN 16-02-2015.

6/15
14/00900 Fyrispurningur um sundurbýti av matr. nr. 45b á Strond

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.02.2015	18/15	
2 Klaksvíkar Býráð	26.02.2015	6/15	

Frágreiðing um málið:
Eigarin hevur vent sær til Umhvørvisstovuna við fyrispurningi um møguleikan at sundurbýta matr. nr. 45b á Strond, soleiðis at økið undir nýliga ábygda seyðahúsinum verður frábýtt til eitt sjálvstøðugt matr. nr.

Lógargrundarlag:
Byggisamtyktin/Matrikuleringslógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan er ikki partur í málinum

Tilmæli:
Eftirsum talan er um øki uttan byggisamtyktarligar ásetingar, og sostatt heldur ongum ásetingum um økisvíddir, hevur Tekniska Umsiting ongar viðmerkingar til fyrispurningin. Víst verður tó til, at Umhvørvisstovan umsitur matrikuleringslógina, sum í hesum føri møguliga avmarkar møguleikan fyri sundurbýti av umrødda matrikli.

Nevndarsamtyktir:
UBN 16-02-2015: Málið verið til kunning, nevndin hevur ongar viðmerkingar til málið.

Býráðsins samtykt 26-02-2015:
Einmælt samtykt at beina málið aftur í nevnd.

7/15
15/0064 Víðarisøla av matr. nr. 1006y

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	16.02.2015	14/15	
2 Klaksvíkar Býráð	26.02.2015	7/15	

Frágreiðing um málið:
Talan er um eitt grundøki undir Grashjalla, sum á sumri 2012 varð selt núverandi eigarum, og lótu tey stykkið grava út, men stykkið er framvegis ikki ábygt. Eigararnir hava sostatt brúkt eina upphædd upp á útgrevstur.

Vísandi til stk. 1 í ognarbrævinum, har tað stendur: «G*rundstykkið má ikki verða selt uppaftur, áðrenn bygt er á tað sethús ella annað eins týdningarmikið hús, uttan at býráðið játtar»* venda eigararnir sær tann 16. jan. 2015 til kommununa við ynski um at sleppa at víðariselja grundøkið.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongin

Tilmæli:
Umsitingin veit ikki um aðrar áhugaðar borgarar til hetta grundøkið, tí verður mælt til at loyva víðarisølu fyri sama m^2-prís, sum tey keyptu stykkið fyri og fyri útreiðslur av útgrevstri, og við somu treytum sum higartil galdandi fyri stykkið.

Nevndarsamtyktir:
UBN 16-02-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-02-2015.

Býráðsins samtykt 26-02-2015:
Samtykt at taka undir við UBN 16-02-2015 og at loyva víðarisølu.

8/15
Framflyting av játtanum frá 2014 til 2015, samlimál - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	24.02.2015	16/15	
2 Klaksvíkar Býráð, *fyrra viðgerð*	26.02.2015	8/15	
3 Klaksvíkar Býráð, *seinna viðgerð*	26.03.2015		

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 20-02-2015, har greitt verður frá málinum.
Í roknskapinum 2014 eru játtanir, sum ikki eru brúktar. Ynski eru um at fáa nakrar av teimum fluttar fram til 2015. Framflytingar av óbrúktum játtanum eru at meta sum eykajáttanir, og tí eigur málið at hava 2 viðgerðir.

Raksturin hjá Klaksvíkar Havn vísir eisini størri avlop, enn mett. Í fíggjarætlanini er avlopið sett til 3,5 mió. kr., men roknskapurin vísir í løtuni 4,6 mió. kr. í avlopi.

Tað eru framvegis rokningar, sum ikki eru bókaðar, og tí verður fyrivarni tikið fyri hesum. Tí verða tølini dagførd, tá málið verður viðgjørt næstu ferð.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Her eru upphæddirnar, sum ynski eru um at fáa flutt fram:

Nýggjur skúli	4.261.317
Ítróttarøkið	3.927.192
Miðbýur	1.000.000
Íløgur at flyta fram	9.188.509
Havnin, rakstur	1.300.000
Samanlagt at flyta fram	**10.488.509**

Framflytingin hjá Klaksvíkar Havn fer til íløgur hjá Klaksvíkar Havn.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 41, stk. 2: «Kommunustýrið kann tó um neyðugt veita eykajáttan. Eykajáttan krevur tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Við hvørja eykajáttan skal verða víst á, hvussu hon verður fíggjað»

Fíggjarligar avleiðingar:
Framflytingar eru at meta sum eykajáttanir. Broytingarnar í fíggjarætlanini hava ikki ávirkan á gjaldføri kommununnar fyri 2015, at ví at talan er um sama avlop - eftir avdráttir - fyri fíggjarárið 2014.

Tilmæli:
Hervið verður málið um eykajáttanirnar ísbv. framflytingar lagdar fyri nevnd og býráð til støðutakan/góðkenningar.

Nevndarsamtyktir:
FíN 24-02-2015: Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 20-02-2015.

Býráðsins samtykt 26-02-2015:
Málið einmælt samtykt við fyrru viðgerð.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI